# Bíligari at neyðtaka í Føroyum

**Av tí at ein gomul lóg er í gildi í Føroyum, er revsingin fyri neyðtøku og neyðtøkuroyndir munandi lægri enn í Danmark. Samstundis er endurgjaldið til ofrini helvtina minni.**

NEYÐTØKUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Revsingin fyri neyðtøkur og neyðtøkuroyndir er lógarfest til at vera fongsulsrevsing.

Í Føroyum er hægst møguliga revsing 6 ár, meðan hon í Danmark er sett upp til 8 ár.

Í Danmark varð revsingin herd í 2002, eftir eitt alment orðaskifti um evnið. Tá kom fram, at fólkið helt, at revsingin var alt ov lág, serliga um hon var samanborin við hini londini í Evropa.

Tí valdu politikararnir, at revsingin fyri neyðtøku skuldi verða harðari.

## Munur á neyðtøkum

Tá arbeitt verður við neyðtøkum í rættinum, vera neyðtøkur býttar upp í ymisk sløg.

Tey trý vanligu sløgini av neyðtøkum í Føroyum eru álopsneyðtøka, har ofrið og neyðtøkumaðurin ikki kenna hvønn annan, og neyðtøkumaðurin loypir á ofrið.

Síðan er tilknýtisneyðtøka, har ofrið og neyðtøkumaðurin á onkran hátt hava haft samband frammanundan neyðtøkuna, sum er tað sum oftast sæst í Føroyum.

Og í triðja lagi er parneyðtøka, har ofrið og neyðtøkumaðurin hava verið í einum parlagi frammanundan. Oftast hendur neyðtøkan stutt eftir at parlagið er liðugt.

## Ymisk revsing

Revsingin fyri ymisku sløgini av neyðtøkum er ymisk og kann eisini vera skiftandi innan eitt slag av neyðtøkum.

Tá talan er um álopsneyðtøku er revsingin sum útgangsstøði hálvtannað ár, men revsingin kann vera harðari, um skerpandi umstøður eru í sakini, sum til dømis at vápn vóru nýtt. Um linnandi umstøður eru, verður revsingin somuleiðis linkað, tað kann til dømis vera, at gerningsmaðurin er yngri enn 18 ár.

Revsingin fyri neyðtøkuroyndir liggur sum útgangsstøði ímillum 6 og 9 mánaðir.

Tátalanerumtilknýtisneyðtøku liggur revsingin ímillum 6 mánaðir og hálvtannað ár. Um harðskapur ikki hevur verið nýttur, er tað vanligt at revsingin er frá 6 til 10 mánaðir.

Orsøkin til, at útgangsstøðið fyri revsingin fyri álopsneyðtøku er hægri enn fyri tilknýtisneyðtøku, er at tað hevur verið vanligt at hugsa, at neyðtøkan er meira tyngjandi fyri eitt offur, ið er vorðið álopið, enn fyri eitt offur, ið frammanundan veit hvør neyðtøkumaðurin er.

Vanliga revsingin tá talan er um parneyðtøku er 6 til 8 mánaðir. Her er revsingin lægri, tí fyrilit verður tikið fyri, at partarnir frammanundan hava verið í einum parlagi, og at ofrið kennir neyðtøkumannin.

– Tað verður tjakst um tað er rímiligt, at revsingin er lægri av hesi orsøk, tí ein neyðtøka er ein neyðtøka, óansæð um partarnir kennast frammanundan. Men soleiðis verður tað handfarið løgfrøðiliga, greiðir Linda Hesselberg, sum er almennur ákæri frá.

## Revsingin herd

Fyri fýra árum síðan, áðrenn lógin bleiv broytt í Danmark, var revsingin fyri neyðtøkur, neyðtøkuroyndir og kynsliga misnýtslu av børnum á sama støði, sum hon er í Føroyum í dag. Síðan lógin bleiv broytt, er revsingin sum útgangsstøði eitt ár hægri enn í Føroyum.

Harafturat verður skilt ímillum neyðtøkuroyndir, so revsingin kann vera hægri, um hon hevur verið serliga grov ella harðskapur er vorðin nýttur. Revsingin er eisini vorðin hægri, um fleiri gerningsmenn hava verið til neyðtøkuna; um hon er framd móti einum barni, ella um neyðtøkan hevur vart í eitt longri tíðarskeið, tá verður neyðtøkumaðurin dømdur til hálvttriðja ella trý ára fongsulsrevsing.

– Í Danmark hevur man sæð, at tann harðara revsingin er sligin ígjøgnum, til dømis í Tøndersakini, sigur Linda Hesselberg.

Tøndersakin er um eina 11 ára gamla smágentu, ið var misnýtt av fleiri ymiskum monnum, har hægsta revsingin ið er givin higartil er 3 ár og 6 mánaðir umframt at gjalda 80.000 kr. í endurgjaldi.

## Politisk avgerð

Tá ein tílík lóg kemur í gildi í Danmark, er tað ein avgerð hjá føroysku politikarunum, um lógin eisini skal broytast í Føroyum. Enn er henda lóg ikki komin í gildi her.

Í Danmark eru eisini ávísar lógarreglur, ið seta fast, hvussu stórt endurgjald neyðtøkuoffur skulu fáa. Har er vanligt at neyðtøkuoffur fáa 60.000 kr. í endurgjaldi.

Men av tí at hesar reglur heldur ikki eru settar í gildi í Føroyum, er tað dómarin ið ásetur, hvussu nógv tey skulu fáa, og her er vanligt at neyðtøkuoffur fáa 30.000 kr. ið er helvtina minni enn í Danmark.

# Revsingin er ov lág

**– Revsingin fyri eitt brotsverk er eitt úttrykk fyri, hvussu samfelagið sær uppá brotsgerðina, sigur Turið Debes Hentze, advokatur. Hon heldur, at revsingin fyri neyðtøkur er alt ov lág í Føroyum**

NEYÐTØKUR
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

– Eg haldi ikki, at tað er í lagi, at ein neyðtøkumaður fær linari revsing fyri at hava framt eina neyðtøku í Føroyum, enn hann ger í Danmark, sigur Turið Debes Hentze, advokatur.

– Orsøkin er helst hon, at tað ikki hevur verið serligt fokus sett á neyðtøkur í Føroyum. Í Danmark hinvegin, er tað komið sum eitt krav frá fólkinum, at tað skuldi løggevast harðari. Løggávan er blivin broytt sum ein fylgja av tí.

– Eg haldi, at vit áttu fylgt tí, sum tey hava gjørt í Danmark.

– Eg haldi ikki at revsingin er nóg høg, tí tað er ein sera grov gerð, tá man soleiðis ger seg inn á eitt annað fólk. Revsingin átti at verðið hægri.



*- Eg haldi ikki at revsingin er nóg høg, tí tað er ein sera grov gerð, tá man soleiðis ger seg inn á eitt annað fólk, sigur Turið Debes Hentze, ið er advokatur og hevur haft nógv neyðtøkumál um hendi*

## Láturligt endurgjald

– Tað er eisini heilt láturligt, at endurgjaldið er so nógv lægri í Føroyum enn í Danmark. Ein neyðtøka kann ikki gerast upp í pengum, men tá man hugsar um hvussu stórur skaðin er, so er tað ein alt ov lág upphædd man bjóðar offrunum.

Í Danmark fær eitt neyðtøku ella incestoffur dupult so nógv í endurgjaldi.

– Tað er eingin skilagóð forklåring uppá hví endurgjaldið skal vera minni í Føroyum. Vit skulu hava eitt trýst frá almennari síðu til løggevararnar, so hetta kann broytast.

Turið Debes Hentze heldur, at tá ein neyðtøka hendir í einum so lítlum samfelagi sum tí føroyska, er offrið enn meira útsett, enn tað hevði verið aðrastaðni.

– Í Føroyum vita øll hvat er hent, og øll tosa um tað. Gentan kann blíva útsett fyri, at fólk ikki trúgva henni, sjálvt eftir at gerningsmaðurin er dømdur. Í einum lítlum samfelagi er góð grund til, at offrið átti at fingið størri endurgjald. Men hóast hetta fáa tey í Føroyum eina láturliga upphædd, greiðir Turið Debes Hentze frá.

– Tað er fullkomiliga vitleyst: Gentan fær kanska oyðilagt sína skúlagongd og skal ganga til psykolog restina av lívinum. Hetta er eitt tekin um, at tað verður ikki nóg væl virt í Føroyum. Vit eru heilt afturútsigld á hesum økinum.

## Vantandi orðaskifti

– Vit burdu fylgt hinum londunum, tí revsingin fyri eitt brotsverk, er eitt úttrykk fyri, hvussu samfelagið sær uppá brotsgerðina, og hvørji virði eru galdandi.

Trupulleikin er, at tann bylgjan, sum hevur verið aðrastaðni, har fólkið krevur, at lógin skal broytast, hevur ikki verið í Føroyum.

Um fólkið setti kravið fram, høvdu politikararnir kunnað sæð, at tað ikki er nóg gott sum er. So hevði lógin, sum er galdandi í Danmark, eisini kunnað komið í gildi her.

Men um einki orðaskifti er um evnið, so hendir einki.